Vilhelm Johannesen, varaformaður í Fíggjarnevndini:

# - Breiðu semjur samgongunnar horvnar

**- Tað er merkisvert, at breiðu semjurrnar, løgmaður eftirlýsti í løgmansrøðuni, ongastaðni eru at síggja í viðgerðini av fíggjarlógini, sigur Vilhelm Johannesen, varaformaður í Fíggjarnevndini, sum eisini stúrir fyri eldraøkinum, nú landsins størsta mál skjótt skal í tingið**

FÍGGJARLÓGIN 2004
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*-Hóast løgmaður eftirlýsti breiðar semjur í løgmansrøðu síni á ólavsøku, hevur samgongan og Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, als ikki givið andstøðuni møguleikan til nakað ískoyti, hóast fíggjarlógin umfatar alt fólkið, sigur Vilhelm Johannesen, varaformaður í Fíggjarnevndini*

Andstøðulimur Javnaðarfloksins í Fíggjarnevndini, Vilhelm Johannesen, tykist ikki vera bjartskygdur undan ársins fíggjarlóg. Uppskotið skal berast fram 30. september, og eftir fyrstu viðger verður fíggjarlógin eina viku seinni latin Fíggjarnevndini, sum so gjøgnumgongur hana grein fyri grein, áðrenn spurningar á fundi verða settir løgmanni og landsstýrismonnunum frá Fíggjarnevndini.

### Karsten vanrøkir uppgávuna

Vilhelm Johannesen vísir eins og andstøðuleiðararnir í Dimmalætting á, at andstøðan higartil als ikki er tikin við í viðgerðina av fíggjarlógini 2004, og serliga er tað sambært varaformanninum í Fíggjarnevndini merkisvert, tá løgmaður í røðu síni á ólavsøku júst legði dent á at fáa breiðari semjur í framtíðini. Løgmaður segði m.a. soleiðis í løgmansrøðuni á ólavsøkuni: »*Hóast eg havi roynt at fáa breiða politiska undirtøku í málum, ið sum fráliður hava stóran týdning fyri samfelagið, má ásannast, at hetta hevur ikki eydnast serliga væl. Eg havi helst mín part av skyldini, men staðfestast má, at politiska skipanin ikki er búgvin til eitt slíkt samstarv. Tað er mín vón, at tíðin fer at arbeiða fyri hesum... fyri saman at fremja grundleggjandi lóggávu, sum røkkur langt inn í framtíðina*«. Sambært Vilhelm Johannesen er púrt einki av hesum at síggja í dag.

- Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, og restin av samgonguni, hava als ikki givið andstøðuni nakran møguleika at koma við ískoyti sínum, og tá talan er um størsta politiska málið, ársins fíggjarlóg, mugu allir partar fáa møguleikan at siga hugsan sína, tí hetta umfatar jú alt fólkið, sigur Vilhelm Johannesen.

Við hesum framferðarhátti væntar javnaðartingmaðurin úr Klaksvík enn ein tepran meiriluta og semju uttan um andstøðuna, og hóast einki nýtt sum so er í hesum, vísir Vilhelm Johannesen á, at heldur skuldi verið roynt at funnið eina breiðari semju, og at talan er um brotin lyfti og kávalótir um ynski og lyfti samgongunnar um breiðari semjur, sum komu til sjóndar í løgmansrøðuni.

### Eldraøkið fyri skotum

Varaformaðurin í Fíggjarnevndini vísir víðari á, at niðurskurðurin á 1% og sparingarnar á tilsamans 36 milliónir krónur samanborið við játtanina 2003 helst fer at merkjast á eldraøkinum.

- Hetta er jú eitt tungt og kostnaðarmikið øki, og tískil er væntandi, at farið verður hagar at spara pening. Hetta er óttin, fleiri føroyingar í dag hava, sigur Vilhelm Johannesen, varaformaður í Fíggjarnevndini, sum við hesum sessinum hevur møguleikan fyri størri ávirkan á ársins fíggjarlóg samanborið hinir andstøðulimirnar.

Í allan gjár var drúgvur samgongufundur í sambandi við fíggjarlógina 2004, og sum skilst eru stór stig tikin fram ímóti endaliga uppskotinum um fíggjarlógina. Tíverri fekst ikki fatur á øðrum viðkomandi politikarum í sambandi við fíggjarlógina 2004 áðrenn evstamark á blaðnum.

Made by you

Fríggjadagin 19. og leygardagin 20. september vitjar ein serfrøðingur frá Montana Idé Møblar á Hálsi. Kom og fá góð ráð og vegleiðing um innrætting við Montana.



Montana er ein skipan, ein fræls skipan, sum tú fritt kanst duga tær innanfyri.
Útgangsstøðið er einfalt, men rúmar óendaligar møguleikar.
Lat hugflogið reika við sniði, litum og virkni.
Dyrka frælsið og tak fólk á bóli við sansaligum skapanarhugi og opnum sinni fyri nýggjum møguleikum.
Og vís hvar tú ert gjøgnum títt rúm.
Tí bara tú merkir, nær tú stendur í tínum rúmi.

Uppl á Hálsi
Tel 35 46 80

Montana



# Almenna umsitingin skerjast

**Fyri at fáa pláss fyri møguligum lønarvøkstri hjá teimum alment løntu, hava allir landsstýrismenn játtað at skerja sína umsiting. Mikunáttina vórðu samgongulimir so dánt samdir um fíggjarlógaruppskotið**

FÍGGJARLÓGIN 2004
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Fyri at fáa pláss fyri møguligum lønarvøkstri hjá teimum alment løntu, hava allir landsstýrismenn játtað at skerja sína umsiting á fíggjarlógini fyri komandi ár.*

*Mynd: Savnsmynd*

Samgongulimirnir høvdu týsdagin seinasta fundin, áðrenn fíggjarlógin fyri 2004 varð send til prentingar. Fundurin var settur til at vera klokkan eitt týsdagin, og ikki fyrr enn hálvgum trý mikumorgunin fann samgongan fram til eina fyribils semju um fíggjarlógina.

Samgongan hevur nýtt fjúrtan dagar longri í ár um fyrireikingararbeiðið til fíggjarlógina enn vanligt er, og sum skilst á formanninum í fíggjarnevndini, Óla Breckmann, so er slettis ikki allar súðir syftar enn, tí sum hann sjálvur málber seg, so er hon bert so mikið fræg, at samgongulimirnir vórðu so dánt samdir, tá partarnir fóru hvør til sín týsnáttina.

Seinastu dagarnar hevur dúgliga verðið gitt, hvørt fíggjarlógin fyri komandi ár fór at geva hall ella yvirskot, og sambært Óla Breckmann, so er ætlanin hjá samgonguna, at fíggjarlógin skal javnviga komandi ár. Fyri at fáa fíggjarlógina at javnviga komandi ár, hevur samgongan arbeitt eitt sindur øðrvísi enn undanfarin ár, men úrslitið er tað frægasta eftir útlitinum, sigur formaðurin í fíggjarnevndini

### Nakrar lógarbroytingar

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, hevur álagt øllum ráðunum at spara 1% fyri komandi fíggjarár. Í tí viðfangi hevur víst á, at fleiri útreiðslur eru lógarbundnar, og tískil er neyðugt við lógarbroytingum, um møguleiki skal verða fyri at fylgja boðunum hjá Karsten Hansen. Spurdur, um tað kom fram á samgongufundinum, hvørjir landsstýrismenn verða noyddir at fremja lógarbroytingar, svarar Óli Breckmann, at tað er longu fastlagt, at einstakir landsstýrismenn mugu gera nakrar lógarbroytingar á teirra økjum.

Formaðurin í fíggjarnevndini nevnir Páll á Reynatúgvu, Bjarna Djurholm og Jacob Vestergaard, sum allir verða noyddir at fremja lógarbroytingar í samband við fíggjarlógina fyri komandi ár.

### Lagt upp fyri lønarhækkanini

Samgongan er samd um at halda aftur í íløgum fyri komandi ár, tí búskaparliga støðan ger, at tað neyðugt at slaka á íløgusíðuni. Kortini er peningur settur av til viðlíkahald av vegakervinum, ferjulegurnar, teknisku skúlarnir í Klaksvík og Havn og ellis- og røktarheim kring landið.

Sum skilst, hevur stóra stríðsmálið undir fyrireikingunum til fíggjarlógina verið, hvussu stórur almenni raksturin skal vera komandi ár. Óli Breckmann vísir á, at almenni raksturin hevur vaksið støðugt seinastu árini, og at kjakið um raksturin fyri komandi ár var knútapunktið á samgongufundinum í gjár.

Í oktober ganga flestu sáttmálarnir út á almenna arbeiðsmarknaðinum, og skulu almennu fakfeløgini fáa sama lønarvøkstur sum privati arbeiðsmarknaðin fekk í vár, so veksa lønarútreiðslurnar nógv komandi ár hjá tí almenna, og harvið eisini raksturin hjá tí almenna.

Spurdur, um samgongan hevur lagt upp fyri eini møguligari lønarhækkan á almenna arbeiðsmarknaðinum, svarar Óli Breckmann, at allir landsstýrismenninir hava játtað at skerja í umsitingini, og inntøkurnar frá skerjingini skulu nýtast til ein møguligan lønarvøkstur hjá teimum alment løntu.

### Størst innhøgg hjá Bjarna Djurholm og Jacob Vestergaard

Undir fíggjarlógarviðgerðini í fjør, hartaði Óli Breckmann tjóðveldislandsstýrismonnunum fyri ikki at gera nóg nógv fyri at skerja á teirra økjum, meðan landsstýrismenninir hjá Fólkaflokkinum gingu undan. Spurdur, um støðan er tann sama í ár, svarar formaðurin í fíggjarnevndini, at størstu innhøggini eru gjørd á økjunum hjá Bjarna Djurholm og Jacob Vestergaard.

– Allir landsstýrismenn spara í umsitingini, og tað er avgjørt positivt, men ein má leggja sær í hug at minsti ágangurin er vendur ímóti Bjarna Djurholm og Jacob Vestergaard, tí útreiðslutrýstið hjá teimum er ikki so stórt. Hinvegin er tað altíð torført at fremja skerjingar á økinum hjá Páll á Reynatúgvu og Bill Justinussen, tí útreiðslutrýsti er stórt og fólk gerast rættiliga skjótt misnøgd við skerjingar á almanna- og heilsuøkinum, sigur Óli Breckmann at enda.

Óli Breckmann um breiðu semjuna

# -Ber ikki til at samstarva við andsstøðuflokkarnar

**Bæði Sambands- og Javnaðarflokkurin hava sítt tilverugrundarlag í danska blokkstuðulinum, og tískil ber ikki til at samráðast við teir um fíggjarlógina, sigur Óli Breckmann, formaður í tingbólki Fólkafloksins**

BREIÐ SEMJA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Løgmaður, Anfinn Kallsberg, legði so bragdliga út undir ólavsøkurøðuni í ár, har hann boðaði frá, at hann ynskti, at flokkarnar á tingi gjørdu meira fyri at tryggja breiðar politiskar semjur tvørturum samgongu- og andsstøðumark.

Í Dimmalætting týsdagin leggja andstøðuleiðararnir, Lisbeth L. Petersen og Jóannes Eidesgaard samgonguna undir fyri ikki at taka andstøðuna upp á ráð í samband við fíggjarlógararbeiðið. Formenninir í Javnaðar- og Sambandsflokkinum førdu millum annað fram, at fíggjarlógararbeiðið aldrin áður hevur verið so afturlatið, og tað er ein keðiliga støða hjá andstøðuna.

Í øðrum londum er rættiliga vanligt, at flokkar finna semjur tvørturum andstøðu og samgongu, men í Føroyum hevur henda siðvenja aldrin tikið á seg,

### Ikki møguligt at samstarva

Formaðurin í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum, Óli Breckmann, sigur, at tað einfalt ikki letur seg gera at samstarva við andstøðuflokkarnar um fíggjarlógina.

– Tann breiða semjan ber sjálvsagt til hugsjónarliga við Sambandsflokkin, og tað hevði eisini verið ynskiligt um borgarligu flokkarnir sýndu ábyrgd og áræði í samband við fíggjarlógararbeiðið, men veruleikin er, at bæði Sambandsflokkurin og eisini Javnaðarflokkurin hava teirra grundarlag í danska blokkstuðulinum, og blokkurin er teirra tilverugrundarlag, og tískil er ikki nógv at samráðast um, sigur Óli Breckmann. Hann vísir á, at andstøðuflokkarnir framvegis halda á við at meyla um, at blokkurin aldrin skuldi verið skerdur, tí so hevði alt verið betri, men veruleikin er nú einaferð tann, at nú er minni at gera fíggjarætlan við, og tann veruleikan mugu vit halda okkum til.

– Veruleikin er at báðar andstøðuflokkarnir hava ein fíggjarpolitikk, ið hevur hall við sær, og tað kunnu vit ikki góðtaka, sigur Óli Breckmann.

– stórt og gott úrval av brúktum bilum frá
REYNI SERVICE P/F

TOYOTA COROLLA 1,8 XLI STCAR 4x4
Skrás.: jun. 96
Km.: 95.000
Sýnaður: mai 03
Prísur: 92.000

TOYOTA CARINA 2,0 XL SEDAN
Skrás.: okt 96
Km.: 207.000
Sýnaður: apr 03
Prísur: 72.000

TOYOTA CARINA E 1,6 L/B
Skrás.: des 93
Km.: 183.000
Sýnaður: sep. 03
Prísur: 55.000

TOYOTA CARINA 1,6 CDX SEDAN
Skrás.: okt. 96
Km.: 73.000
Sýnaður: aug. 02
Prísur: 84.000

TOYOTA CARINA E 1.6 XLI S/D
Skrás.: sep. 95
Km.: 196.500
Sýnaður: aug. 03
Prísur: 74.000

TOYOTA AVENSIS 2.0 DIESEL D4-D SEDAN
Skrás.: okt. 01
Km.: 90.000
Sýnaður: -
Prísur: 182.000

TOYOTA COROLLA 1.3 XLI SEDAN
Skrás.: apr. 96
Km.: 111.000
Sýnaður: aug. 02
Prísur: 76.000

TOYOTA COROLLA 2,0 D
Skrás.: feb. 98
Km.: 188.000
Sýnaður: -
Prísur: 89.000

TOYOTA COROLLA 1,6 LINEA TERRA L/B
Skrás.: apr. 00
Km.: 85.000
Sýnaður: -
Prísur: 116.000

TOYOTA AVENSIS 1,8 TERRA STW
Skrás.: juni 00
Km.: 30.000
Sýnaður: -
Prísur: 142.000

TOYOTA CARINA 1,6 XLI GINZA L/B
Skrás.: apr 96
Km.: 106.000
Sýnaður: -
Prísur: 74.000

TOYOTA YARIS 1,5 T SPORT 3D
Skrás.: jun. 02
Km.: 29.000
Sýnaður: -
Prísur: 140.000

TOYOTA COROLLA 1,3 XLI SEDAN
Skrás.: aug. 93
Km.: 160.800
Sýnaður: mai 03
Prísur: 54.000

TOYOTA RAV 4 1,8 4x2 3D
Skrás.: nov 02
Km.: 30.000
Sýnaður: -
Prísur: 210.000

TOYOTA COROLLA 1,3 STW
Skrás.: des. 96
Km.: 50.000
Sýnaður: -
Prísur: 110.000

TOYOTA COROLLA 1,9 D SEDAN TERRA
Skrás.: jul. 00
Km.: 106.000
Sýnaður: mar. 03
Prísur: 127.000

FORD ESCORT 1,8 TURBO DIESEL
Skrás.: mar. 99
Km.: 148.000
Sýnaður: feb. 03
Prísur: 69.000

BMW 1,8 IS COUPÉ
Skrás.: mai 93
Km.: 211.000
Sýnaður: mai 03
Prísur: 79.000

OPEL ASTRA 1,7 D
Skrás.: des 98
Km.: 134.000
Sýnaður: aug. 02
Prísur: 87.000

FORD ESCORT 1,8TD
Skrás.: jun. 97
Km.: 109.000
Sýnaður: mar. 02
Prísur: 75.000

SEAT TOLEDO 1,9 TDI
Skrás.: nov. 99
Km.: 95.000
Sýnaður: feb. 02
Prísur: 138.000

FORD FIESTA
Skrás.: mai 96
Km.: 53.000
Sýnaður: -
Prísur: 38.000

OPEL ASTRA 1,6 H/B
Skrás.: des. 95
Km.: 117.000
Sýnaður: nov. 02
Prísur: 57.000

FORD PUMA 1,4 COUPÉ
Skrás.: sep. 00
Km.: 31.500
Sýnaður: -
Prísur: 122.000

FORD FOCUS S/D
Skrás.: okt. 99
Km.: 41.000
Sýnaður: aug. 02
Prísur: 134.000

OPEL ASTRA
Skrás.: okt. 99
Km.: 75.000
Sýnaður: -
Prísur: 110.000

PEUGEOT 106 1,4 INDEPENDENCE
Skrás.: jan. 96
Km.: 84.000
Sýnaður: -
Prísur: 82.000

G.g. bilarnir á listanum kunnu vera seldir
Toyota bilar hava trý ára garanti frá fyrsta regestrerings dato
Bilar yvir kr. 75.000,- hava 3 mðr. brúktbilaváttan

REYNI SERVICE P/F
Vegurin Langi - 188 Hoyvík - Tel. 313040